## Ronaldo ongan veg

Cristiano Ronaldo var støðugt partur av yvirskriftum kring alt Europa í summar, men nú sigur hann, at hann als ikki ætlar sær úr Manchester United. – Eg havi nú spælt her í fimm ár, og eg kenni meg heima í felagnum. Eg havi vunnið nógv við felagnum, og eg eri fegin um at vera her, segði Ronaldo, eftir at hann um vikuskiftið fekk handað gylta bóltin frá France Football. Verandi sáttmálin hjá Ronaldo við Manchester United gongur fram til 2012, men tað hevur ljóðað, at spælarin longu nú ynskir sær eina lønarhækkan.



## StÍF-Stjørnan týsdagin

Eftir skipanini skuldi dysturin millum StÍF og Stjørnuna í Sunset-kappingini spælast sunnudagin. Leygardagin sendi Hondbóltssambandið tó fráboðan um, at dysturin varð útsettur. Ístaðin verður spælt týskvøldið, og tá hevur Stjørnan so møguleika at minka um munin upp til VB.

Neistin-Tjaldur 27-27 (15-17):

# Renna aftaná oddanum

**Neistin og Tjaldur deildu stigini sína millum, tá tey hittust í høllini á Hálsi um vikuskiftið. Úrslitið hevði við sær, at hvørki av teimum otaðu seg nærri oddanum**

HONDBÓLTUR

*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Undan hvørjum kappingarári eru gitingarnar nógvar, hvussu leikur fer komandi mánaðirnar. Soleiðis var eisini í ár. Tey flestu vóru á einum máli um, at Stjørnan fór at verða í oddanum, har VB, Neistin og kanska Tjaldri skuldu kappast við klaksvíkskvinnur. Og tað sær út til at passa rættiliga væl.

Neistin og Tjaldri eru trýst í løtuni. Tær hava meira ella minni mist sambandið við oddan, og stig skulu fáast til høldar sum skjótast. Tað vistu bæði liðini undan dystinum leygardagin. Og tær samdust um, at hvørgin skuldu sleppa úr støðuni. Dysturin endaði við javnleiki, og tað broytti lítið á stigatalvuni.

### Tjaldri byrjaði væl

Tað vóru gestirnir úr Runavík sum løgdu bragdligari fyri. Serliga høvdu tær úr Neistanum trupult at verja fyri stórspælandi Adina Petra. Hon stóð fyri fimm av teimum fyrstu 10 málunum hjá Tjaldrinum, har hon eisini átti fleiri málgevandi avleveringar. Hon var toppskjútti við 12 málum.

Gestirnir høvdu leiðsluna í stórum løtum av fyrra hálvleiki. Neistin kom ongantíð av álvara ígongd, har Annika Ljósstein við nøkrum málum syrgdi fyri, at leiðslan ikki gjørdist ov stór.

Støðan í hálvleikinum var 17-15 til Tjaldri.

### Neistin burdi vunnið

Liðini fylgdust eisini í seinna hálvleiki. Tað var ein góð løta, har lítið riggaði hjá Tjaldrinum. Tær gjørdu fleiri mistøk í álopspartinum, men tað dugdu neistakvinnur illa at gagnnýta. Hóast tær fleiri ferðir vóru fríar móti málverjanum, so vunnu tær ikki leiðsluna, sum runavíkskvinnur høvdu. Tá seinna umfari var hálvliðið var Tjaldri á odda 22-19.

Eingin megnaði at avgerða dystin, sum endaði við javnleiki 27-27. Eitt úrslit, sum hvørki hóvaði Neistanum ella Tjaldrinum.

### Nú verður trupult

Tað er alsamt meira sum bendir á, at stríðið um gullkrónurnar fer at standa millum VB og Stjørnuna. Neistin og Tjaldri eru í løtuni ávikavist fimm og fýra stig eftir oddaliðið úr Vági, og komandi vikuskiftið skulu fýra tey fremstu liðini hittast. Tjaldur spælur í Klaksvík móti Stjørnuni, meðan Neistin skal til Vágs. Tað verður eitt sera týdningarmikið vikuskiftið fyri bæði liðini, har teirra leiklutur í oddanum í føroyskum kvinnuhondbólti skal avgerast.



*Tjaldur helt heilt leingi munin móti Neistanum, men kortini munnu tær ikki vera heilt ónøgdar um javnleikin, sum tær fingu við sær*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**FAKTA**

**Neistin – Tjaldur 27-27 (15-17)**
10 min: 7-6
20 min: 8-14
40 min: 18-20
50 min: 23-23
**Neistin**: Annika Ljósstein 7 (3), Stine Mikkelsen 4, Nico R. Hansen 4, Trine Mayland 3, Anja Heinadóttir 3, Unn Kragesten 2, Heidi Maria Akselsen 2, Rakul Augustinussen 2
**Tjaldur**: Adina Petrea 12 (3), Jacoba Langgaard 5, Patru Marinela 3, Heidi Sevdal 3, Jóhanna í Króki 2, Elinbjørg Hammer 1, Annika Thomsen 1,
**Útvísingar**: Neistin 3 – Tjaldur 4
**Dómarar**: Karstin Joensen og Kristian Joensen

VÍF-Kyndil 31-25 (16-9):

# VÍF vikast ikki

**Vestmenningar halda enn ferðini í somu øði. Í klassikaranum var ivin ongan tíð tann stóri sunnudagin**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Spenningurin um stóra klassikaran hevur mangan verið størri í Vestmanna, enn hann var tað sunnudagin.

VÍF hevur í ár hildið til har, sum teir helst vilja vera, meðan tað hjá Kyndli hevur sæð heilt øðrvísi út.

Tí var VÍF stórfavorittur undan dystinum, og fyri steðgin settu teir eisini tað mesta upp á pláss. Seinna partin av fyrra hálvleiki vundu teir á heimaliðnum veruliga burtur úr mótstøðuni, og hóast Kyndil royndi at reisast eftir steðgin, so skaptu teir ongan tíð av álvara spenning í aftur dystin.

Við sigrinum halda vestmenningar fast í góðu gongdini, og enn eru teir tvey stig framman fyri bæði H71 og Neistan. Kyndil er hinvegin framvegis við botni við einum stigi.

**FAKTA**

**VÍF-Kyndil 31-25 (16-9)**
10 min: 4-1
20 min: 11-5
40 min: 21-13
50 min: 23-20
**Málskjúttar**
**VÍF**: Agnar Joensen 9(2), Niels Andreasen 9, Áki G. Olsen 5, Sámal Joensen 3, John Zachariassen 2, Joen Pauli Høgnesen 2, Dávur Magnussen 1
**Kyndil**: Janus Einar Sørensen 7(2), Bárður Johannesen 6, Hans Áki Dal-Christiansen 6(1), Høgni Klein 3, Tummas Pauli Hanusarson 2, Andreas Sølsker 1, Rói Lamhauge 1
**Brotskøst**: VÍF 3, Kyndil 5
**Útvísingar**: VÍF 8, Kyndil 3
**Diskvalifikatión**: VÍF 1 (3X2 minuttir)